# Mazda MPV – nú sum diesel

## Japanarar best



Týska bil magasinið "Auto Motor und Sport" spurdi herfyri sínar 65.000 lesarar, hvussu teir vóru nøgdir við sínar egnu bilar. Úrslitið vísti, at tey sum høvdu japanskar bilar sum heild vóru best nøgd. Í meðalklassanum lá Lexus IS 200 á odda

*Kelda: Politikken*

## Navn í Frankfurt



Ein nýggjur lítil Kia, sum enn ikki hevur fingið eftirnavn, verður á bilaframsýningini í Frankfurt. Bilurin, ið verður avloysari hjá Kia Pride, er gjørdur í samstarvi við Ford og Mazda. Hvussu bilurin kemur at eita, verður avdúkað á framsýningini

*Kelda: MotorMagasinet*

## C2 í september



Nýggi Citroën C2 sum bleiv frumsýndur á bilaframsýningini í Geneve í vár, verður í Føroyum um miðjan september. Bilurin er bygdur yvir sama plattform sum Citroën C3, tó er hann nakað minni

*Kelda: Ivan Johansen Bilar*

**Mazda MPV er ein MPV og eitur MPV. Bilurin livir eisini upp til navnið, tí hann er ein stórur og rúmligur 7 persónabilur. Tað sum er vorðið er áhugavert við bilinum, er, at hann nú eisini fæst sum diesel**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tá nýggi Mazda MPV kom á marknaðin fyri umleið tveimum árum síðan, var bilurin ikki so áhugaverdur, sum hann annars hevði uppiborið. Orsøkin var, at hann ikki fekst sum diesel, men tað ger hann nú.

Mazda MPV er á leið somu støðd sum Kia Carneval og tann styttri Chrysler Voyager. Talan er um ein stóran rúmligan 7 persónabil. Sum á flestu MPV eru nógvir møguleikar við setrunum, har til ber at brúka stólaryggin til borð, ella taka setrini heilt úr um brúk er fyri meira plássi.

Dragihurðarnar í síðunum hava el-drivnar rútar, tó eru trygdarskipanir, sum gera, at vandi ikki er fyri, at høvdið kemur í klemmu millum hurðina og stólpan. Gott pláss er allar vegir í bilinum, og nógv pláss er til at legga lutir frá sær á, bæði framman, í síðunum og undir loftinum. Tey sum sita á aftastu rekkju hava møguleika at stilla hitan sjálvstøðugt.

Umframt 2,3 litur bensinmotorin við 142 hk, fæst Mazda MPV nú við einum 2,0 litur turbodiesel motori við common-rail innspræning og 136 hk. Motorurin hóskar væl til bilin, larmar lítið og trekkjur væl. Um ein bilur í hesum klassanum skal gera seg galdandi á marknaðinum, skal hann helst fáast við einum kvikum og orkusparandi dieselmotori.

Bilurin er væl útgjørdur við t.d. aircondition, fjarstýrdum sentrallási, el-síðurútum, el-síðuspeglum, 16" alu-felgum. Mazda MPV fæst eisini sum vøruvognur.




*Sølumaðurin hjá Berg Motors, Axel Ljósheim, við Mazda MPV diesel*





*Sjey sitipláss og dragihurðar á síðunum*



*Axel sýnir her 2,0 litur turbo dieselmotorin við 136 hk*

### Mazda MPV 2,0 diesel

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 2,0 litur 4 syl. diesel við 136 hk<br>v. turbo og common-rail innspræning |
| 0-100 km/t: | 13,2 sek. |
| Oljunýtsla: | 14,8 km/l |
| Dekkstødd: | 215/60-16 |
| Støðd og vekt | |
| Longd: | 475,0 cm |
| Breidd: | 183,0 cm |
| Hædd: | 178,0 cm |
| Eginvekt: | 1550 kg |
| Viðførisrúm: | 294 litrar v. 7 setrum<br>866 litrar v. 5 setrum |
| Prísur: | kr. 318.700,- ( 7 persóna )<br>kr. 226.700,- ( vørubilur ) |
| Søluumboð: | Berg Motors<br>Staravegur 1-3<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 313535 |

# ítróttur

Nr. 171 • hósdagur • 11. september 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Annað umfar í marathonkappingini

**Annað umfarið í árligu Daewoo Marathon Cup kappingini verður í Klaksvík leygardagin**

RENNING
*tíðindaskriv*

Leygardagin 13. september skipar Ítróttafelagið Treysti fyri 2. umfari av Daewoo Marathon Cup 2003 í Klaksvík. Í fjør luttóku 65 rennarir í hesi kappingini. Teinurin hjá teimum vaksnu verður aftur hesaferð 5 km, á einum strekki sum skal rennast fýra ferðir. Kappingin byrjar og endar heilt har úti á Stoksoyravegnum. Runnið verður frá endanum av Stoksoyravegi niðan á Bumshamarsveg og heimeftir til Kelduskákið, har verður snara til vinstru omanaftur á Stoksoyravegin. Børnini renna eftir Torvgøtu og Stoksoyravegi. Børn -7 og -10 renna 700 metrar, meðan børn -13 og -17 renna 870 metrar.

**Skrá :**

Kl. 11.30
Avheinting av startnr. hjá Pit-Stop

Kl. 12.00
5 km vaksin (1985 ella fyrr)

Kl. 12.30
Børn -7 ár (1996 ella seinni)

Kl. 12.40
Børn -10 ár (1993-1995)

Kl. 12.50
Børn -13 ár (1992-1992)

Kl. 13.00
Børn -17 ár (1986-1989)

Aftaná verður heiðursmerkni handaði á staðnum.

Støðan eftir fyrsta umfar, sum var í Havn fyri tveimum vikum síðani er tann, at hjá monnunum er Guttorm Sørensen fremstur, meðan Jonhard Larsen úr Treystinum nummar tvey og Sigurð Justinussen úr Bragdinum er nummar trý. Íalt 22 menn eru framvegis við í kappingini, meðan ongin kvinna luttók í Havn. Hjá veteranunum er Ólavur H. Olsen fremstur, meðan Henning C. Poulsen og Krisjan Christiansen eru ávikavist nummar tvey og trý. Teir eru allir úr Bragdinum.

Kappingin hjá børnum er eins og hjá teimum vaksnu samansett av fýra rennikappingum, men verða hesar tilsamans 4.219 metrar (ella 1/10 marathon) til longdar hjá børnum -13 og -17 og 2.109 metrar (ella 1/20 marathon) hjá børnum -7 og -10 verður samlaði teinurin). Vinnari av Daewoo Mini Marathon Cup verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin. Fyri hvørt umfar verða latin heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3. Eisini hjá børnunum verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3 samanlagt, tvs. bert børn, sum hava gjøgnumført øll fýra umførini, telja við í samlaða úrslitinum av Daewoo Mini Marathon Cup. Fyrireikararnir úr Treystinum leggja dent á, at rennikappingin leygardagin er fyri øll, og vóna teir, at luttøkan verður góð.

Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá Frælsur Ítróttur Føroyar, sum er: www.athletics.fo.

Tilmeldingarfreistin á heimasíðuni er fríggjakvøldið á miðnátt.



*Næsta umfarið í Daewoo Marathon kapprenningini verður í Klaksvík leygardagin*



*Umframt tey vaksnu sleppa børnini eisini at royna seg, og tað plagar ikki at vera minni áhugavert*